DAGSINS MEINING

Ávaringar

Tríggir danskir biskupar hava um vikuskiftið álvarsliga ávarað móti einum álopi á Iraq. Hesir kirkjumenn vísa á, at eitt kríggj móti Iraq fer at elva vanliga fólkinum í Iraq ófatiligar líðingar. Skaðin, oyðileggingarnar og líðingarnar av hesum kríggi fara at vera so ómetaliga stór og víðfevnandi, at hetta kann vigast upp í móti tí at fáa einarææðisharran frá valdinum. Biskuparnir gera vart við, at sum heimurin er skipaður í dag, eru aðrir mátar at fáa eina ódemokratiska stjórn burtur, um tað er neyðugt. Teir vísa á, at kríggj heilt einfalt verður ein ov høgur prísur fyri at fáa eina demokratiska stjórn til valdið í Iraq.

Tað munnu vera mong, sum eru samd við donsku biskupunum. Teir hava ivaleyst grein í sínum máli, tá ið teir vísa á kostnaðin fyri vanliga fólkið av einum kríggi móti Iraq. Afturat kemur so hesin spurningur: hvørja vissu hevur Vesturheimurin fyri, at ein veruliga demokratisk stjórn kemur í staðin fyri Saddam Hussein, um hann verður rikin frá valdinum við kríggi? Svarið man ivaleyst vera, at vit als onga vissu hava fyri hesum.

Afturat hesum kemur so tann stóri spurningurin um harðræði Husseins nú er veruliga orsøkin til at USA vil sleppa at loypa á Iraq. Tað finnast vitturliga einaræðisstjórnir víða hvar í Miðeystri, Asia, Latínamerika og Afrika, ið er eins harðrendar og vandamiklar fyri heimin og Saddam Hussein. Hví ikki rudda frá einum enda av? Svarið kann vera oljan hjá Iraq. USA gerst alt meira heft av innfluttari olju. Iraq hevur triðstørsta oljuríkidømi í heiminum. Tað kann væl vera, at stjórnin hjá Busch vil hava ræði á hesum ríkidømi í framtíðini.

Eitt álop á Iraq er tí ikki moralskt forsvarligt og eitt álop er eisini politiskt og hernaðarligt sera vandamikið fyri allan heimin. Eitt tílíkt álop fer at seta kílar inn í NATO og ES eins og tað fer at uppfatast sum ein krossferð móti muslimska heiminum. Og síðst men ikki minst fer eitt álop at seta alt Miðeystur í brand. Eitt kríggj kann eisini at breiða seg til Pakistan, Iran og Afghanistan, og føra til fólkauppreistur í Egyptalandi, Turkiinum, og øðrum muslimskum londum. Vit standa í eini sera vandafullari støðu og tað er at vóna, at leiðararnir í Vesturheiminum halda høvdið kalt og finna ein útveg at sleppa av við Saddam Hussein uttan kríggj. Hóast Irak er fjarskotið frá okkum, so eiga vit føroyingar eisini at hava eina meining um hetta álvarsmálið, tí eitt lemjandi kríggj fer eisini at fáa álvarsligar avleiðingar fyri okkum. Hugsið bara um fiskiskipaflotan, um oljuprísirnir fara til himmals. Tí kundi verið áhugavert at hoyrt, hvat eitt nú løgmaður heldur um støðuna, og hvat okkara bispur heldur, nú vit síggja, at bæði biskuppar og leiðandi politikarar í okkara grannalondum hava eina meining um hetta.

Sosialurin

VIÐMERKINGAR

At hjálpa har, sum tað treingist mest

Jákup Lindenskov

Skelkandi útmelding, Sámal Lindenskov, leiðari av sambýlinum í Eystursstræti hevði, tá GESTURIN var í Sjónvarpinum hóskvøldið. Framløga Sámals gav greiða ábending um skilaleysu, ja mannminkandi handfaringina, sum Løgtingið hevur givið teimum almennu Føroyum, nú tingið staðfesti púra skilaleysa niðurskurðin av ríkisveitingini 366 milliónir krónur árliga. Skelkandi, at Javnaðarflokkurin tók undir við hesum nasjonalromantiska floppi.

Vit kunnu nú staðfesta, at tíðandi ábøtur og ajourføringar av heilsuverkinum verða blokeraðar langa framtíð.

Sámal gav greiða mynd av støðuni hjá teim sálarliga sjúku, tey sita í saksinum og fáa ikki stuðul og hjálpina vit kundu givið teimum, um farið varð fram við skili og í skinsemi.

Løgtingið hevur blokerað, at sálarliga sjúku kunnu fáa ta røkt og viðgerð, teim tørva, og sum vit kundu givið teimum, um blokkurin ikki var molstreraður.

Og tí mugu tey sálarliga sjúku nú svíða undir knallhørðum nasjonalromantiskum politikki, og tað átti Javnaðarflokkurin ikki at spælt við í.

Tá stóra útbyggingin av landssjúkrahúsinum og sálarsjúkrahúsinum varð framd, var gjaldsbýtið 50/50 land og ríki, tó so at ríkið bar raksturin av sálarsjúkrahúsinum, men 1. apríl 1976 varð nýggj sjúkhúslóg samtykt, samstundis bleiv gjaldsbýtið alt 50/50 land og ríki.

Men so hendir lítið aftan á fastløgdu útbyggingarnar, sum mundu enda fyrst í 80'unum.

Allar nýætlanir verða lagdar til viks, og ístaðin skal álit skrivast um framtíðar bygging.

Men veruleikin var ein annar, politiska leiðslan valdi at negla fyri. Útbyggingar steðgar, mæðað verður burtur av viðgerðarbygningum, umfatandi bygging til fyrisiting verður nú prioriterað. Skrivstovuslátur heldur enn at bøta um røkt og viðgerð hjá sálarliga sjúkum er helst nærri sannleikanum. Partvíst hvørva endir – eisini sjúkrasystaraskúlin.

Umsitingin krevur sítt, víst so, men ikki akkurát hóli og innbúgv av dýru sort, men einki er tá sagt um at sparast má. Og tá alt nú er so »sára gott« , lok oman á røkt og viðgerð.

Orðið røkt sigst vera »óhóskandi« málbering, tá vit tosa um sjúkrahús, vekk við tí, tykir huglagið vera. Gomul, hjálparleys – út av sjúkhúsinum – »heim« við teimum.

Gomul og hjálparleys, sum ikki so sjáldan ongan góðan eiga at taka ímóti sær heima, verða send »heim« , tí »sovorðin eru ikki ætlað« sjúkrahúsinum, »ikki ráð, ikki pláss« er niðurlagið!

Nei, hava ikki ráð av berari og kaldari nasjonalari romantismu.

Nær fer Javnaðarflokkurin at siga okkum, hví flokkurin nú at enda atkvøddi fyri at sparka heilar 366 milliónir árliga av landinum, var tað nú ikki »brúk fyri teimum«?

Ella hevur flokkurin gloymt fremstu uppgávu sína, at hjálpa har, sum tað treingist mest!

Viðmerking til form. Miðfloksins og Jónfinn Olsen form í UFM

Kári P. Højgaard, Løgtingsmaður, Sjálvstýrisfloksins.

Tøkk fyri áheitan tína um ikki at hava at Jenisi av Rana og skal eg taka hana til eftirtektar, men má heilt stutt svara onkrum av tí, sum er ført fram.

Vit hava eina nýbygging av landsjúkrahúsinum, sum eftir øllum sólarmerkjum, verður liðug fyrr enn mett varð. Hetta gevur okkum ein positivan trupuleika, sum sjálvsagt skal loysast. Talan er ikki um gjaldføristrupuleikar, tí við ársenda vóru omanfyri 2 mia. í landsbankanum. Tað sum eg royndi at føra fram var, at loysnin er samstarv heldur enn hóttan. Nevar í borðið ella knívar á barkan gera, at menn ikki verða tiknir í álvara. Tann tíðin tá Gamli Tróndur og aðrir vórðu drignir undan rekkjuvánni og fingu tvinnar kostir í at velja, antin broyta trúgv ella missa høvdið er tíbetur farin, ella hvussu?

Nær verður bygningurin klárur at taka í nýtslu?

Mær vitandi eru allir flokkar í løgtinginum samdir um, at bygningurin skal takast í brúk, so skjótt sum gjørligt. Vit mugu politiskt semjast um keyp av tólum, figgingarmynstur, vita nær bygningurin kann verða klárur at taka í nýtslu og áseta opningardagin, áðrenn hetta kann kunngerast fyri borgarum landsins. Einasta sum kann forða fyri eini skjótari og góðari loysn, er sjálvdráttur og "sjálvprofilering".

Trúvirði hjá undirritaða nýtist Jenis av Rana løgtingsmaður ikki at sáa iva um. Tað vóni eg at mínir samgongu og samstarvsfelagar kunnu vátta.

Viðmerking til greinina: »Hvør húsmóðir visti, hvat fór at henda við Jørgeni«

Elisabeth Guttesen og Marin Samuelsen (deiltíðarhúsmøður)

Heilt erligt!! Hvat heldur Kjartan Joensen er í vegin fyri, at húsmøður eru framskygdar á jøvnum føti við onnur?? Heldur hann, at tær bara eru vitandi um innlýsandi ting.

Hevði tað ikki mangan sæð betri út og verið betri skil á, um t.d. fleiri húsmøður vórðu við at taka avgerðir í Landsins Leiðslu?

Vit spyrja bara.

Sosialurin

Sosialurin
Stovnaður: 1927
Ábyrgdarblaðstjóri: Jan Müller
jan@sosialurin.fo
Blaðstjóri: Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
Fíggjarleiðari: Jákup Mørk
jakup@sosialurin.fo

Marknaðardeild: lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad
finnbjorg@sosialurin.fo
Durita Simonsen durita@sosialurin.fo

Blaðfólk:
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo
Ingrid Bjarnastein ingrid@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliasen solby@sosialurin.fo
Jón Brian Hvidtfeldt
jonbrian@sosialurin.fo
Dagfinn Olsen dagfinn@sosialurin.fo
Ingi Rasmussen ingi@sosialurin.fo

Ítróttur:
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

Myndamenn:
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

Sosialurin í Norðoyggjum:
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
Sosialurin í Suðuroy:
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo
Sosialurin í Eysturoy:
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 4449520
tel. 225429
e-post: vilmund@sosialurin.fo
Sosialurin í Vágum:
360 Sandavágur
tel. 333820, 220507 fax 333720
e-post: edvard@sosialurin.fo
e-post: vagar@sosialurin.fo

Uppseting/prent:
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
Útgevari:
Sp/f Sosialurin
Avgreiðsla:
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
Postadressa:
Postboks 76, 110 Tórshavn
E-mail:
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

Lýsingar

Freistir:	Tekstlýsingar	Størri lýsingar	Lýsingartorgið	Heilsanir
Týsdagsblaðið	Mán.kl. 10	Frí. kl. 15	Frí. kl. 12	Frí. kl. 12
Mikudagsblaðið	Týs. kl. 10	Mán. kl. 15	Mán. kl. 12	Mán. kl. 12
Hósdagsblaðið	Mik. kl. 10	Týs. kl. 15	Týs. kl. 12	Týs. kl. 12
Fríggjadagsblaðið	Hós. kl. 10	Mik. kl. 15	Mik. kl. 12	Mik. kl. 12
Leygardagsblaðið	Frí. kl. 10	Hós. kl. 15	Hós. kl. 12	Hós. kl. 12

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framihjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

Støddir:
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

Innsent tilfar
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnug um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.

VIÐMERKINGAR

Ferðaseðlaprísurin

Gerhard Longberg. Løgtingsmaður og borgarstjóri



Ja, nú komu boðini. Prísurin at ferðast skal minst 20% upp. Og helt ein verri tænasta.

Eini boð, sum skaka okkum, sum búgva uttanfyri miðstaðarøkið. Ja, nú er miðstaðarøkið stórt. Eg taki Vágoy, Eysturoy og Streymoy sum miðstaðarøki.

Men hvat, kunnu vit liva við hesum? Vit minnast tá prísirnir vóru kunngjørdir fyri at koyra gjøgnum undirsjóvartunnilin. Tá stóðu Føroyar næstan eftir einum enda. Men hvat, skuku vit bara góðtaka hesi ófrættaboðini nú?

Nei, her mugu vit, sum enn noyðast at brúka skipini standa saman ølsl ímóti øksl.

Eg má sjálvur staðfesta, at eg eri ein ársungi í landspolitikki. Men tó havi eg uppliva, at tað er ikki bara sum at siga tað, at hava eina meining sum fer tvørs av teimum fínu og mentaðu, so kann tú rokna við at verða forfylgdur.

• Nú er okkara ungu barnafamiljur og onnur vitnir til, at mjólkin hækkar munandi.

• Nú verða tey, sum skulu brúkta strandferðsluna, mest ung fólk sum flyta seg til arbeiðis, at prísirnir skulu hækka.

• Nú verða vit vitni til sum búgva í útjaðaranum, at flyta fisk, tá verða vit verri fyri enn tey sum búgva á meginøkinum.

Hvat er meiningin? Fyrst skal stuðulin til tey virkini sum liggja á útoyggjunum minkast, sum um hetta ikki var nógmikið, so skulu prísirnir hækkast við strandferðsluni.

Undirritaði legði merki til, at hesi punktir saman við nógvum øðrum vóru minkaði á fíggjarlógini fyri 2003.

Men her var ein játtan, sum hækkað var úr 2,8 mill. Og til 3,2 mill., og tað var til Leikpall Føroya.

Undirritaði var so frekur, (tí soleiðis skilti eg tað aftaná), at seta broytingaruppskot fram saman við tveimum fólkafloksmonnum og einum miðflokkamanni um, at Leikpallur Føroya skuldi fáa somu upphædd sum í 2002. Tað má eg so siga, at hetta hevur Gerhard hoyrt fyri síðan.

So eg vóni, at eg fari at hoyra lika nógv til hesi fínu á meginøkinum nú. Tað sær út sum, at útjaðarin skal avtoftast, spakuliga. Tað kundi hent seg, at onkur mentan var at finna úti á oyggjunum, sum kann síðustillast við mentanina hjá teimum fínu á meginøkinum.

Nú skal eg bara taka aftur íaftur, hvat er tað fyri tænastustøði, sum skal lækkast t.d. til Sandoy:

„Teistin" siglur síðsta túr av Gomlurætt kl. 19.15. Vit hava ongan livandi møguleika at gera nýtslu av nøkrum á meginøkinum – vit eru totalt avskorðin.

Ella, er tað tann tænastan, har vit síggja skopunar ingar vassa ímillum bussar og annað til hús, tí at Bygdaleiðir ikki vilja koyra túrin ígjøgnum Skopunar bygd áðrenn farið verður heimeftir. Ongin tænasta, slettis ongin.

So tænastan kann vara fara ein veg, og tað er at betrast. Síðsti túrur av Gomlurætt skuldi verið kl. 22.30.

Tað havi eg havt frammi í tinginum, og vóni eg, at tað gerst veruleiki.

Men til síðst vil eg so innarliga heita á Bjarna Djurholm, landsstýrismann, um at gera okkurt sum forðar hesum ófrættatíðindum at gerast veruleiki. Og ikki minst landsstýrismanninum í útoyggjamálum, Eyðun Eltør. Vælsignaður, rópa neyðarróð saman við okkum, ella eru hetta avleiðingar av blokkinum?

Men til allarsíðst, eg havi álit á Bjarna Djurholm at hetta ikki hendir.

Opið bræv

Góði Eyðun Klakkstein

Tað var við stórari undran at eg las Sosialin leygardagin 18 jan. Fyri tað fyrsta lat tú meg vita, at samrøðan tú gjørdi við meg áðrenn jól, skuldi nýtast til tína próvtøku á journalistháskúlanum í Århus. Hevði eg vita, at samrøðan eisini skuldi nýtast til eina blaðgrein, hevði eg neyvan sett stundir av til hetta. Havi haft nógvar gevandi samrøður við tíðindafólk í seinastuni, so hendan var ikki neyðug. Í hesum feri royndi eg bert at vera beinasamur og hjálpa tær.

Tað var serliga yvirskriftin; "Føroyingar skilja ikki Sunleif", ið fall mær í eyguni. Um hetta er tín høvuðskonklusión, hevur tú ikki fingið røttu fatanina av samrøðu okkara. Nevndi júst fyri tær, at eg var sera fegin um, at tað vóru 1400 fólk úr øllum Føroyum, ið hoyrdu frumframførsluna av mínari symfoni, og havi eg aftaná fingið nógv góð orð við á vegnum um hetta verk. Nevndi eisini, at tónleikasøgan hevur lært okkum, at partiturtónleikur, ella sokallaður "klassiskur tónleikur", hevur ongantíð haft tann stóra lurtaraskaran, og er mín tónleikur einki undantak.

Við hesum báðum brotum úr okkara samrøðu og kenslum av at føroyingar, sum heild, taka væl ímóti mínum tónleiki, er tín yvirskrift; "Føroyingar skilja ikki Sunleif", heilt burturvið.

Vinarliga,
Sunleif Rasmussen

Svar

Góði Sunleif

Samrøðan, sum eg gjørdi við teg, var á ongan hátt ætla sum bara »ein skúlauppgáva«. Hon var eisini ætlað almenninginum, og tað helt eg meg greiða frá. Hevði eg havt illgruna um, at tú helt, at talan bara var um eina »skúlasamrøðu«, hevði eg als ikki gjørt hana.

»Føroyingar skilja ikki Sunleif« er ikki høvuðsniðurstøða í greinini. Í grundini stendur tað als ikki í greinini. Tað er ein partur av eini forsíðu, sum leggur upp til eitt av tínum áhugaverdu sjónarmiðum um munin millum tøkniliga menning og tónleik.

Hóast nógvar gevandi samrøður longu eru gjørdar við teg, vóni eg, at samrøðan við teg leggur okkurt afturat søguni um tónaskaldið, sum gongur nýggjar leiðir og bjóðar lurtarunum av.

Eyðun Klakstein

Ferðaseðlaprísirnir hjá Strandferðsluni

– mugu ikki sleppa at vera við til at avtofta útjaðaran

Johan Dahl, Løgtingsmaður

Tað er undarligt at at sita og lita á meðan sitandi samgonga – hendan samgongan sum hevur gingið undir sloganini at:

– Menna útjaðaran og -

– Geva útjaðaranum og útoyggjum kor soleiðis, at útjaðarin ikki er fyri prísella kappingaravlaðing orsakað av fjarstøðu síni.

Og hvat gera teir nú??

Júst tað øvugta – teir eru við at:

– hækka allar prísir á ferðing og flutningi við strandferðsluni til og frá útjaðaranum við umleið 20% eins og teir lækka túratalið til t.d. Suðriar og gera hervið tað, at útjaðarin verður enn verri fyri, enn hann er, tí færri fólk ferðast, tá prísurin er ov høgur.

– Menningin innan vinnulív o.a. verður skerd orsakað av somu orsøkum sum nevnt omanfyri – hon verður kappingaravlagað.

– Harafturat sum stein oman á byrðu, so skerja/-minka teir allan flutningsstuðul har sund og firðir skilja og gera harvið vinnuni í útjaðaranum óbøtaliganska.

– so ikki kann sigast annað enn, at hendan samgongan, sum skuldi loysa føroyingin úr trælahaftinum hjá dønum og gera okkum nógv frælsari og dynamiskari er við at binda okkum niður og gera okkum til eina bananrepublikk – tað sæst á øllum brøgdum – vit kunnu bert skeita at skilinum í samgonguni.

Sambandsflokkurin kemur í næstu døgum at leggja uppskot fyri Løgtingið viðv. ferðа - og farmagjøldunum hjá tí almenna SSL og vónar við tí uppskotinum at forða fyri, at útjaðarin verður tann, sum kemur at gjalda prísin fyri vanstýringini og ovurnýtsluni seinastu 4 árini undir sitandi samgongu.

Játtanin hjá strandferðsluni er ikki hækkað samsvarandi hækkandi lønum og rakstraútreiðslum – tað er orsøkin til støðuna – hetta er eitt politiskt mál, sum má loysast skjótast.

Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum tykkum,
ið sýndu okkum samkenslu tá kæra kona, mamma, vermamma, omma og langomma okkara

Elinborg Sámalsdóttur Lervig
Skála

andaðist og bleiv jarðað.

Tøkk øll tit, ið vóru í kapellinum, við heimið, í kirkjuni tá hon kom heim, og tit, ið fylgdu henni til jarðar.

Tøkk til allar kirkjutænarar, prest og sangarar.

Tøkk fyri mat, ið vit fingu í heimið og til ervið, tøkk fyri blómur, kransar, heilsanir og gávur til Leguhúsið í Nesvík.

Øllum verður ynskt Guðs ríku signing í nýggja árinum.

Familjunnar vegna
Jóhan, Maritha, Tummas, Sámal Petur og Joan Eilin

Tøkk

Okkara hjartans tøkk til øll tykkum,
sum vístu okkum samkenslu og hjálpsemi,
tá kæra og høgt elskaða dóttir, systur, mamma, svigarinda og mostur okkara

Evy Roma Kristensen

andaðist og varð jarðað.

Tøkk fyri minnisgávur til børnini Irenu og Fróða, blómur, kransar og troystarrík orð frá m.a. Vilhelm presti í heiminum, Zion og kirkjugarðinum. Eisini tøkk til starvsfólkið á Landssjúkrahúsinum, ið gjørdu tað, ið tey kundu fyri Evy.

Tøkk til tykkum, ið ringdu, sendu kort og komu á gátt og sum fylgdu henni til hennara seinasta hvíldarstað.

Tøkk til dagrøktina, sum er um Irenu og Fróða í teirra sváru tíð – takka vit hjartaliga.

Semona, Connie, Diana og Linda við familjum